Álit

í

løgtingsmáli nr. 53/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum vegna nýggja rættargangslóg fyri Føroyar (Strika tilvísingar til løgreglumál og politimál o.a.)

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni K. Petersen, hevur lagt málið fram tann 5. desember 2023, og eftir 1. viðgerð tann 7. desember 2023 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 11. desember 2023.

Í nýggju rættargangslógini, sum kom í gildi 1. januar 2021, verður ikki longur skilt millum løgreglumál/politimál og onnur mál. Hetta uppskotið snýr seg um at strika tær seinastu tilvísingarnar í føroyskari lóggávu til "løgreglumál" og "politimál". Áður er hetta sama gjørt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 um broyting í ymsum lógum vegna nýggja rættargangslóg fyri Føroyar (Broyttar greinatilvísingar í serlógum o.a.).

Ein samd nevnd tekur við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 11. desember 2023

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur